Rannsókn Vesturi í Horni í Syðrugøtu

Leon Andreassen

Í 1972 fekk Fornminnissavnið frá landsverkfrøðinginum yvirlit yvir vegaætlan í Syðrugøtu. Ein gjøgnumgongd vísti, at alt bústaðarøkið Vesturi í Horni kom at liggja undir nýggja landsvegnum. Tað tóktist ikki gjørligt at leggja vegin á øðrum stað, og Fornminnissavnið gjørdi tí av, at økið skuldi rannsakast.

Rannsóknin byrjaði í sept. 1973, men vegna ring veðurlíkindi varð lagt stilt fyri veturin. Í mars 1974 varð byrjað aftur og arbeitt nærum uttan slit, til rannsóknin endaði 19. sept. 1975.

Hjálparfólk hava verið hesi: Peder Paule Huusgaard, Jónfinn Thomsen og Høgni Rasmussen, allir Syðrugøtu, Torben Diklev og Símun V. Arge, Tórshavn, Djóni Dalsgarð, Velbastað, Bodil Göransson, Lund og Franz von Jessen, Keypmannahavn.

Staðarlýsing og søguligt yvirlit.

Vesturi í Horni í Syðrugøtu er ovast í gamla bønum, uppi við Fornagarð, o. u. 30 m yvir sjónum og o. u. 200 m frá sjóvarmálanum, ella júst har Fornigarður og landsvegurin krossast (sí mynd nr. 1, yvirlitskort).

Her uppi er útsýnið gott yvir alla Syðrugøtu bygd, gomlu bústaðirnar »á Lækjuni« og »Toftamørk« og alla Gøtuvík, út í hav so langt eygað røkkur.

Søgn er, at Oyrarbóndin, sum nú býr niðri í bygdini, áður búði Vesturi í Horni.[1]

Onnur søgn sigur, at Oyrarbóndin ta fyrstu tíðina, eftir at hann var fluttur oman í bygdina, hevði húskall, ið æt Símun, ið búði Vesturi í Horni, har hann røktaði ungneytini. Harav sigst Símunar-

hylur, sum er í Mataránni o. u. 20 m sunnanfyri, at bera navn sítt.[2]

Tá gamli bygdavegurin frá 1922—25 varð gjørdur, varð hann lagdur á bústaðarøkið Vesturi í Horni. Tá komu menn niður á nógva øsku, teir funnu eisini ein kvarnarstein úr fløgugróti.[2]

Rannsóknin.

Alt rannsóknarøkið er uml. 250 m². Tilsamans eru tríggjar toftir rannsakaðar, toft 1, toft 2 og toft 3. 265 lutir eru skrásettir í gripaskrá savnsins við Snr:4356. Fyri ikki at tarna ferðsluni ov nógv var neyðugt at býta rannsóknarøkið í trý. Fyrst varð toft 1 norðan fyri koyrivegin rannsakað, og tá hon var liðugt rannsakað, varð ferðslan løgd norður á lidna økið. Síðan var gamli koyrivegurin grivin burtur og toft 2, sum var undir honum rannsakað. At enda varð toft 3, sum er sunnan fyri koyrivegin rannsakað. Nakað eystan fyri toft 2 var øska og brent grót. Helst var hetta partur av 4. toftini, men vegna tess, at hon var nógv órógvað av norðurendanum av toft 3 og truplum umstøðum annars, varð hon ikki rannsakað.

Toft 1.

Toftin vendir S-N, hon er sett á morenurygg. Hon er nógv órógvað av velting, víkiplássi og vatnveiting frá 1908. Støðið til vesturveggin er lutvíst varðveitt, tað er bæði ein- og tvílaðað og er upp til 1,50 m tj. Tvílaðaður er tann parturin, sum er í útnyrðingshorninum. Veggurin er bugaður.

Eysturveggurin er nærum allur burtur, bert partur av støðinum norðast er varðveittur, restin er helst órógvað av vatnveiting frá 1908. Tann parturin, sum er varðveittur, er bugaður.

Norðurveggur er eingin; hann hevur heldur ikki verið, men 1,00 m br. dyr eru settar millum eystur- og vesturveggin. Suðurveggur er eingin, men eg meti hann hava verið júst har, sum vegarveitin var, ella kanska hava toftirnar 1 og 2 verið samanbygdar.

Hetta hava sostatt verið eini hús, sum innan hava verið 7,00 m l. og 3,50 m br. á miðjuni.

Eldstaðurin er syðst, hann er 1,25 m l. og 1,00 m br. Vestast í honum er fløt hella.

Sunnari partur av toftini hevur steinsett gólv, sum fyri norðan



Mynd nr. 1. *Yvirlitsmynd av Syðrugøtu har tey bústaðarøki, ið nevnd eru í greinini, eru merkt við klingru.*

er avmarkað í beina linju. Norðari parturin hevur moldgólv oman á morenuni. Møguliga hava húsini verið skildrað í tvey, men tá hvørki stólpahol ella veggjarstøði finnast, meti eg steinsetingina í sunnara helmingi vera til tess at bøta um jarðarmunin, sum er stórur — heilir 75 cm ella 11/m. Norðast eystast liggja tveir stórir steinar, tann eystari hevur verið nýttur í eysturvegginum, hin hevur verið inni í húsinum.

Eystur frá toft 1 og suður til koyrivegin er steinsett tún.

Sum tað skilst av frágreiðingini av toft 1, so er bert eitt, sum er greitt, og tað er, at tað hava verið eini sethús. Tá toftin er so nógv oyðiløgd, verður ógjørligt at lýsa útsjónd ella byggihátt.

Toft 2.

Toft 2 stendur á sama morenuryggi sum toft 1, men vegna tess, at morenuryggurin fyri sunnan gongur burtur í einki, er hesin parturin uppbygdur.

Hóast toft 2 liggur undir koyrivegnum frá 1922—25, er hon væl betur varðveitt enn toft 1.

Áðrenn húsini vóru bygd, varð ein 2,00 m br. og 0,65 m djúp grøv grivin niður í leirið vestanfyri. Leirið varð nýtt til uppfylling undir gólvinum sunnast í toftini. Upp við gravarbakkanum fyri eystan, inn móti húsinum, er einlaðaður grótveggur laðaður upp í gólvhædd. Nevndi veggur gongur heilt norður í norðurveggjarstøðið, og har hann endar fyri sunnan, gongur tvílaðaður veggur 0,40 m vestur úr honum. Nevndi stubbi er varðveittur við 4 umførum av gróti, og tað er týðuligt, at hann er laðaður vestur móti onkrum, og illa er hugsandi annað, enn at tað hava verið einar dyr, og tá so er, má annar veggur hava verið vestanfyri, ella kanska er sjálvur bøgarðurin nýttur sum útveggur (sí mynd nr. 2).

Støðið til norðurveggin er varðveitt; har er kulla grivin niður í leirið og grót lagt í. Støðið er 1,2 m br., so tað hevur helst verið tvílaðaður veggur ella ífyllingarveggur.

Eysturveggurin er bygdur upp við sjálvum morenuskráanum, og hóast hann er nakað órógvaður, so sæst, serliga í útnyrðingshorninum, rættilig samanbinding í laðingini longu niðan fyri gólvhædd. Hann hevur verið tvílaðaður.



Mynd nr. 2. *Inngongd í toft 2, sað vestan.*

Sum áður nevnt er sunnari partur av toft 2 uppbygdur; hetta kemur serliga til sjóndar, har støðið til suðurendan er (sí mynd nr. 3).

Her eru flagbøkkar og nakað av gróti lagt millum stóran stein í landsynningshorninum og suðurendan á einlaðaða vesturvegginum. Við tað at støðið fyri tað mesta er flag, vil eg meta, at suðurveggurin sjálvur eisini hevur verið flagveggur, og eftir støðinum at døma hevur hann verið bugaður.

Gólvið alt er varðveitt uttan sunnasti partur; tað er steinsett við

fløtum hellum og malargróti, men norðast er morenan nýtt til gólv. Ein fráveiting liggur suður gjøgnum toftina. Á miðjum gólvi, oman á fráveitingini, er nakað av øsku og brendum gróti, og tá menn í 1922—25 hava funnið øsku her, er eingin ivi um, at hetta eru leivdirnar av eldstaðnum.

Mitt í toftini, 0,40 m frá norðurvegginum, er stólpahol. Tá eg sigi, at stólpin stendur mitt í húsinum, so er harvið meint mitt í millum einlaðaða veggin fyri vestan og eysturveggin, ella mitt í høvuðsbygninginum.

Sum nevnt omanfyri, so fæst nøkulunda hylling á, hvussu húsini á toft 2 hava verið. Tað hevur verið ein bygningur við tveimum rúmum, ein høvuðsbygningur, 5,50 m l. og 4,00 m br. og eitt rúm við vestursíðuna, 5,50 m l. og uml. 1,80 m br., sum er grivið niður í morenuna, við gólvi uml. 0,65 m lægri enn tað í høvuðsbygninginum.

Stólpin, sum stendur mitt í høvuðsbygninginum, má roknast at hava borið mønutræ. Onnur stólpahol eru ikki funnin, men samsvarandi stólpi má hava verið í tí nógv órógvaða suðurendanum. Tá rúmið við vestursíðuna er grivið niður í leirið, er tað helst fyri at fáa hóskandi hædd millum gólv og tak uttan at gera kovareisingina ov fláa, tí hetta er ringt fyri vind og staðið er vindhart.

Toft 3.

Nakað í ein landsynning frá toft 2 liggur toft 3. Hon vendir S-N og er væl varðveitt.

Útveggirnir eru allir varðveittir við einum ella tveimum umførum, teir eru ífyllingarveggir og eru, 1,25—1,50 m tj. Meðan toft 1 og toft 2 eru frá sama tíðarskeiði, er toft 3 yngri, norðari endin á henni er grivin niður í eldri búseting, sum helst er samstundis við toft 1 og 2, men sum vit ikki fingu møguleika at rannsaka.

Toft 3 er skildrað sundur í tvey, skilaveggurin er einlaðaður og er varðveittur við tveimum umførum.

Norðara rúmið er 3 × 3 m innan og hevur dyr vestureftir. Gólvið er fyri tað mesta steinsett, men í støðum — norðast — er leirbotnurin nýttur til gólv. Fram við vegginum er fráveiting løgd, norðast er hon grivin niður í leirið og hellulok lagt omanyvir.



Mynd nr. 3. *Skurður 48,20 m V. Skurðurin vísir grót og flag í suðurveggínum á toft 2. Sað eystan.*

Sunnast móti skilavegginum er lægd niður í leirið, hon er fylt við gróti og nýtt sum fráveiting. Hon liggur fram við vesturvegginum oman í sunnara rúmið og út.

Sunnara rúmið er 1,75 × 3 m innan. Dyrnar eru í sjálvum landsynningshorninum oman móti bygdini. Gólvið er fyri tað mesta lagt oman á leirið, tó er steinsett fram við vesturvegginum. Mitt á gólvinum er lítil eldstaður, hann er óregluliga rundur og er settur á sjálvan leirbotnin.

Tá tvey rúm eru, hvørt við síni inngongd, og einki er, sum bendir á dyr millum rúmini bæði, so er greitt, at talan er um tvey endamál við húsinum.

Eingir stólpar ella stólpahol eru funnin í toft 3, hvørki í gólvinum ella úti við veggin (sí mynd nr. 4).

Úrslit.

Toftirnar 1 og 2, sum báðar eru frá somu tíð, mugu sigast vera eindømi her hjá okkum higartil, bæði hvat viðvíkur stødd og sniði. Heldur ikki hevur eydnast mær at finna skrivligt tilfar, ið bendir á somu fyribrigdi í hinum norðurlondum. Fyrispurningar til íslending, norðmenn, svia og finna hava eisini verið til fánýtis. Sostatt er greitt, at sjálvur byggihátturin onga ábending gevur um tíðarfesting.

Av teim 265 lutunum, sum funnir eru, eru 111 pottabrot; tvey teirra — sum bæði hoyra saman — eru úr fitisteini, restin er úr leiri.

Hinir lutirnir býta seg soleiðis: 1 heingilás úr bronsu og jarni, 1 beltisspenni úr bronsu, 6 brýni úr skifursteini, 2 renlar úr fitisteini, 6 vaðsteinar, 1 kola, 2 viksteinar og 16 metallutir, men ikki er vist, hvat teir eru nýttir til. Hinir lutirnir eru viðarsprek og djórabein. Fleiri av viðarsprekunum eru tilevnað, og trý teirra eru av stavíláti. At viðgera hvønn lut sær her verður ov langrøkið, men lat meg nevna, at tey 109 pottabrotini úr leiri eru límað saman, har tað var gjørligt, og tað hevur eydnast okkum at fáa 5 ymisk ílátasnið.

Av leirinum hevur Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingur, kannað nøkur brot og er komin til ta niðurstøðu, at tað er føroyskt leir, sum er illa sáldað.

Roknast má við, at fólkini eru flutt, og tá so er, hava tey tikið alt nýtiligt við sær.



Mynd nr. 4. *Toft 3, sað norðan.*

Viðvíkjandi tíðarfesting havi eg eins og Sverri Dahl[13] valt at vera varin; tað føroyska tilfarið er enn so lítið kannað, at ikki er ráðiligt at nýta tað sum haldgott tíðarfestingartilfar.

Fitisteinsílátið, Snr: 4356/30 og 4365/100 er av bolla og hevur eitt tvm., ið er 160 mm um tromina. Tromin er bólin innan. Ílátið er slætt innan, men facetterað uttan, t. e. uttan er ílátið høgt við hvøssum vatnrøttum røðum við beinum flatum ímillum, harí tættar loddrættar rípur eru høgdar.(sí mynd nr. 5).

Í Borglund í Noregi er hetta ílátasniðið tíðarfest til 1050—1350[4].



Mynd nr. 5. *Fitisteinsbollin, Snr: 4356/30 og 4356/100.*



Mynd nr. 6. *Bronsuspennið, Snr: 4356/101.*

Mynd nr. 7. *Heingilásið, Snr: 4356/239.*

Hetta skal tó takast við fyrivarni, tá hetta er higartil einasta fitisteinsílát, sum funnið er í Gøtu.

Beltisspennið, Snr: 4356/101 úr bronsu, er funnið í toft 2. Tað er 27 mm langt og 22,5 mm br. Framman á spenninum er eitt djórahøvd, tað er nakað tært, men eyguni eru greið. Festið aftan og broddurin eru burtur. Spennið er rættiliga líkt einum, sum funnið er í Íslandi, og Kristján Eldjárn metir djórahøvdið at vera í Borrestíli, ár 900—1000[5] (sí mynd nr. 6).

Viðvíkjandi tíðarfesting av toft 3 er at siga, at eingin lutur er funnin í henni, sum við vissu kann sigast hoyra til hana. Tey pottabrot og ein rennil, sum har eru funnin, eru úr fylluni í vegginum ella undir gólvinum og kunnu sostatt hoyra til toft 1 ella 2 ella helst ta búsetingina, sum toft 3 er grivin niður í.

A

B



C



D

Mynd nr. 8. *A og B, Brýni úr skifursteini. C, Rennil úr fitisteini og D, Fitisteinsílátabrot, sum ætlað er til rennil, men hann er ikki liðugt tilevnaður.*

Niðast í fylluni í vesturvegginum, beint niðri á morenuleirinum, er funnið eitt heingilás úr jarni og bronsu, Snr:4356/239 (sí mynd nr. 7).

Hetta slagið av heingilásum verður tikið í nýtslu í norðurlondum í víkingatíðini[6] og eru vanlig langt upp í miðøldina.[7] Sostatt meti eg toft 3 at vera frá eini tíð, tá omanfyri nevnda lás ikki hevur verið í nýtslu, eina ferð eftir ár 1200.

Í Syðrugøtu finnast — umframt Vesturi í Horni — trý onnur búpláss kring í bønum: Norðuri í Forna (eisini nevnt Norðuri á Sýn) rannsakað av Sverra Dahl 1948—1950, sí Fróðskaparrit 1. bók, bls. 159—175, á Lækjuni og Toftamørk (sí yvirlitskort). Øll hesi búpláss eru niðurløgd fyri 1584. So kann ein spyrja: Hví liggja hesi fornu búpláss spjadd í bønum uttan heimrustir? Fullfíggjað svar er ikki møguligt at geva í dag; møguliga verður spurningurin loystur, tá øll búplássini eru rannsakað og sammett hvørt við annað.

Í Føroyingasøgu lesa vit at »Tróndur leigaði heimajørðina í Gøtu burtur til nógvar menn og tók so høga leigu, sum kundi fáast«.[8]

Freistandi er at seta hesi nevndu búpláss í samband við hetta brotið úr Føroyingasøgu.[9]

BÓKMENTIR

1. E. Húsgarð: Um búseting í Syðrugøtu, Varðin bd. 31, 1955.
2. Munnlig frásøgn eftir Peder P. Huusgaard, Syðrugøtu.
3. Sverri Dahl: Tvey fornminni í Syðrugøtu, Fróðskaparrit 1. bók.
4. Siri Myrvoll Lossius: Kleberkarmaterialet fra Borglund Arkeologiske Avhandlinger, No. 1—1977 Bergen.
5. Kristján Eldjárn: Kuml og haugfé, Reykjavík 1956.
6. Kulturhistorisk Leksikon for Nordisk Middelalder, bd. XI København, 1966.
7. Vilh. La Cor: Næsholm, København 1961.
8. C. C. Rafn: Færeyínga Saga, København 1832.
9. A. Thorsteinsson: Forn búseting í Føroyum, Fróðskaparrit 26. bók, bls. 61—63.

SUMMARY

Between 1973 and 1975 an excavation was carried out at the former settlement Vesturi í Horni at Syðragøta. The area is above the present village, about 30 metres above sea level and 200 metres from high water mark.

The total area examined is about 250 square metres. Altogether three sites were examined, sites 1, 2 and 3. 265 articles and fragments were found, of which 111 were potsherds.

Site 1.

7 × 3.5 metres at the middle. The site is so badly damaged that it is not possible to make any estimate of the kind of construction. All that can be said with certainty is that it was a house.

Site 2.

This is also a house which was divided into two, a main building 5.5 × 4 metres and a room on the west side, 5.5 × c. 1.8 metres dug down in the moraine. Consequently its floor is c. 0.65 metres lower than that in the principal building.

Site 3.

While sites 1 and 2 date from the same period, site 3 is more recent. It is divided into two. The room to the north is 3 × 3 metres inside and has a door to the west.

The room to the south is 1.75 × 3 metres with a door in the south east corner, overlooking the village.

As there are two rooms, each with its own entrance and with no connecting door, it is obvious that this building must have served two different purposes.

CONCLUSIONS

As stated above, sites 1 and 2 are from the same period. In order to date them I have — with suitable caution — made use of the belt clasp and the soapstone bowl.

In Borgund in Norway this type of vessel is dated to 1040—1350.

The belt clasp closely resembles one found in Iceland, estimated by Kristján Eldjárn to be from AD 900—1000.

No fragments were found on site 3 which can safely be said to belong to it.

Under the material filling in the foundations of the west wall a padlock of iron and bronze was discovered.

This kind of padlock came into use in Scandinavia in the Viking Age[6] and was common well into the Middle Ages.[7]

Thus I estimate site 3 to be from a period when these locks were no longer used, some time after AD 1200.